# Jól í Ukraina

Tá Jólini verða hildin í ukrainsku heimunum, er tað "Sviata Vechera" – Hin Heilaga Kvøldmáltíðin – sum hevur størst týdning. Tíðum er hálmur partur av borðdúkinum, hetta fyri at minnast hálmin í fjósinum, í Betlehem. Tá ukrainsku børnini síggja tað fyrstu stjørnuna - sum ímyndar komuna hjá Teimum Trimum Vísmonnunum - á tí eystara hválvinum kann Sviata Vechera byrja. Í landbúnaðarøkjum tekur húsbóndin nakað av hveiti inn í húsið. Hetta fyri at staðfesta tann stóra týdningin hveiti hevur havt fyri ukrainska fólkið, í nútíð og fortíð! Hendan siðin nevnar ukrainar "Didukh". Didukh merkir beinleiðis týtt: "Andi Abbans", so Didukh er ein ímynd av forfedrunum í familjuni. Í nógvum ukrainskum heimum hava tey koyrt hveitið í ein vasa. Ein bøn verður søgd, og húsbóndin sigur tað siðbundnu jólaheilsuna. Jólaheilsanin verður nevnd "Chrystos Rodyvsya", sum merkir "Kristus er føddur"! Familjan, sum situr við borðið svarar einmælt aftur: "Slavite Yoho!", sum merkir "Gevið honum dýrd". Í summum familjum verður gamla slaviska máliskan "Chrystos Rozhdayetsya" nýtt.






















